# Munnligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sirið Stenberg, løgtingsmaður

**Svarari:** Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

**Evni:** Kapellið á Landssjúkrahúsinum

**Spurningar:**

1. Hvør er orsøkin til, at kapellið á Landssjúkrahúsinum ikki er tøkt í løtuni?
2. Nær kann roknast við, at kapellið aftur kann brúkast sum kapell?

**Viðmerkingar:**
Sum skilst er kapellið á Landssjúkrahúsinum ikki tøkt í løtuni.

Kapellið hevur eina sera týdningamikla funktión. Nógv flest fólk fara foldum frá á sjúkrahúsunum, og tað er partur av jarðarferðini, at tey nærmastu kunnu fara í kapellið, áðrenn farið verður til sjálva jarðarferðina.

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús, og fólk úr øllum landinum doyggja eisini har. Tá hevur verið vanligt, at farið varð úr kapellinum, áðrenn farið varð víðari til heimbygdina hjá viðkomandi at halda sjálva jarðarferðina. Hetta hevur givið mongum møguleika at luttaka og siga farvæl har.

Fyri familju og avvarðandi er løtan í kapellinum sera týdningarmikil og partur av eini virðiligari samkomu, sum eisini hevur stóran týdning fyri eftirtíðina, bæði andaliga og eksistensielt.

**Á Løgtingi, 20. juni 2022**

Sirið Stenberg